0-16 ÁR

TM Junior

Páskatilboð



-20%

Alla vikuna







TM Junior

Vit eru millum Lampubúðina og Skálabúðina

Dr. Jacobsensgøta 15
Tel 31 10 99



FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat ella
Kára á Rógvi, adv.fulltrúa um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo


# Útbjóðing

Í sambandi við bygging av Sambýli í Gøtu verður hervið boðið út alment.

**Málara og gólváleggingararbeiði**
Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi **hósdagin 25. mars** við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Tilboð skulu, saman við útbjóðingartilfarinum, latast inn á kommunuskrivstovuna við Gøtugjógv í afturlatnum brævbjálva merktur:

**Sambýli í Gøtu**
**Málara og gólváleggingararbeiði**
**Tilboð**

í seinasta lagi mikudagin 14. apríl 2004, kl. 1400

Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi verða hjástaddir.

**Sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 – fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Útbjóðing av málaraarbeiði

Vegna Fuglafjarðar kommunu verður málaraarbeiði í sambandi við skúlabygning í Fuglafirði boðin út í almennari útbjóðing.

Arbeiðið umfatar ein skúlabygning í tveimum hæddum tilsamans 750 m².

Lisitatiónin verður í Býráðshúsinum í Fuglafirði tann 1. apríl 2004 kl. 14.00 og kunnu teir, ið boðið hava, verða hjástaddir.

Útbjóðingartilfar kann bíleggjast hjá Fuglafjarðar kommunu, tlf. 444006 innan mikudagin 24. mars 2004 móti veðhaldi kr. 4.000,- sum verður at gjalda inn á konto í Føroya Banka nr. 6460 2205965.

Fuglafjørður, 18. mars 2004
**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild


TELDUDEILDIN

Laserprintari
Brother HL-1430.



1.798.-

Skrivar upp í 14 s/min. 600 dpi. 15 sek. upphiting. Er sera bíligur í rakstri. Einans 30 oyru pr. ark. Hevur parallel og USB íbinding og kann sostatt knýtast til 2 teldur samstundis uttan at vera á lokalneti. Kann brúkast til Windows 95/98/Me/2000/XP og MAC OS.

VØRUHÚSIÐ Á HJALLA - TEL 34 25 00



Sosialurin
-tað loysir seg

i



Minnist til haldaragjaldið av Føroya besta blaði



Síðsti rættstundis gjaldsdagur er 28. mars 2004

Argjaivegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo
Sosialurin



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo




Barnagarðurin á Konmansmýru

# Leiðari til Vøggustovu

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðara í barnsburðarfarloyvi frá 15. apríl 2004 til 31. august 2005. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevara-felagið, lønt eftir lønarstig 22 til 28.

Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyristingarligu ábyrgdina av stovninum. Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum, kann tryggja stovninum eina positiva menning. Tað er týdningarmikið, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Bert umsøkjarar, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv, kunnu søkja starvið.

Tað kann upplýsast, at eftir ætlan verður skrivstovufólk sett í starv, at taka sær av bókhald v.m.

Nærri fæst at vita um starvið frá Katrin Bjarnadóttir á tlf. 31 31 31.

Umsókn við prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi innan 6.apríl 2004.

Umsóknir verða at senda til:

**Vøggustovuna á Konmansmýru**
Att: Nevndin
Hoyvíksvegur 41 B
100 Tórshavn

Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru er sjálveigandi stovnur við heimstað í Tórshavn. Endamáli stovnsins er barnaansan um dagin. Í vøggustovuni eru 3 stovur, 35 børn og 12 starvsfólk.

# Skrivstovufólk (avloysari)



Søkt verður eftir avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi frá 1. mai 2004 til 1. februar 2005 til avgreiðsluskrivstovuna hjá Statens Luftfartsvæsen - Vága Floghavn at taka við sum skjótast. Viðkomandi skal taka lut í at loysa verkevni stovnsins.

STARVSØKI TÍTT VERÐUR:

- Lønaravrokning
- Fyrireiking av data til uppkrevjing af floghavnsgjøldum
- Útgreina hagtøl
- Dagføring av hondbókum
- Dagføring av sjúku- og feriulistum
- Postur, móttøka, skráseting og innanhýsis skifti íroknað
- Uppritar- og tilvísingararbeiði
- Fyrifallandi arbeiði, so sum ljóstøka, skjalaskipan, ansa telefon og annað

VIT VÆNTA, AT TÚ:

- Hevur grundleggjandi førleika í samband við skrivstovuarbeiði
- Hevur góðan kunnleika til teld
- Hevur sjálvstøðugan, skilvísan hugburð til at loysa umsitingarlig verkevni og ert før/ur fyri at greiða fleiri mál um somu tíð
- Dugir væl at orðbera teg í talu og í skrift
- Ert fús/ur, samvitskufull/ur og miðvís/ur og hevur vilja og evni at samstarva á ymiskum stigum
- Vil taka lut í verkætlanum í samband við raksturin í floghavnini
- Ert liðilig/ur og nærlagdur/løgd í samband við at fremja arbeiðið, kanst taka stig og hava hug til at veita góða tænastu

VIT BJÓÐA:

Eitt starv í skapandi, stundum spentum, og mennandi arbeiðsumhvørvi.
Fjølbroyttar og avbjóðandi arbeiðssetningar, ið venda sær úteftir.
Løn smbrt. sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

FLEIRI UPPLÝSINGAR:

Hevur tú tørv á fleiri upplýsingum, ber til at venda sær til Statens Luftfartsvæsen, Vága Floghavn á telefon 354400.

Skrivlig umsókn at senda til Statens Luftfartsvæsen, Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 31. mars 2004.

Upplýsingar um floghavnina annars finnast á heimasíðu okkara: www.slv.dk/vagar

Av tí at SLV tekur undir við javnstøðu, verður heitt á bæði kyn um at søkja starvið.

**Trafikministeriet**  **Statens Luftfartsvæsen**

Statens Luftfartsvæsen (SLV) er en statsvirksomhed under Trafikministeriet.
I SLV arbejder ca. 220 mennesker med at skabe forudsætninger for sikker civil luftfart.

# Frá Vágs kommunu

Hervið verður matr. nr. 610 h á Løðhamri lýst til sølu.

Talan er um grundøkið uppá tils. 574 fermetrar. Býráðið hevur samtykt at á økinum kann skrivstovubygningur ella líknandi byggjast eftir nærri áseting frá teknisku nevnd.

Boð um keyp av matr. nr. 610 h skulu stílast til:

**Vágs kommunu**
Tekniska nevnd
900 Vágur

og er freistin at bjóða uppá grundøkið sett til 01. mai 2004.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu boðini, ella einki at taka

**Vágs kommuna**
Tekniska nevnd



# Vaskifólk søkist

Søkt verður eftir vaskifólki til P/F Sandoy Seafood í Skopun.

Arbeiðið umfatar vasking av pakki-/reinskerihøll o.a.

Áhugað biðjast ringja tlf. 361316.

# Leyst starv

Starv sum happadráttarseljari

**í Tórshavn**
(starvið hjá Reyða Krossi Føroya)

er leyst at søkja.

Setanin er galdandi frá 1. juli 2004 at rokna.

Samsýningin er 10% av søluni.

Skrivlig umsókn verður at senda nevndini fyri happadráttin sum skjótast og í seinasta lagi 31. mars 2004.

Nevndin fyri
**Hin Føroyska Happadráttin**
Gundadalsvegur 27
100 Tórshavn

# Solar Føroyar

Vit sóknast eftir fryntligum og fyrikomandi fólki til goymslu okkara.

Hevur tú útbúgving sum elektrikari, er tað ein fyrimunur

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at senda eina umsókn, ella ringja til:

solar Føroyar
Brekkutún 2 · Hoyvík · Tel 35 79 33 · fax 31 78 90 · teldupost: finn@solar.fo

# Frá Salong Fríbjørg

Frisørsalongin verður stongd vegna páskafrí frá 2. apríl til 12. apríl

Opið verður aftur 13. apríl.

**Salong Fríbjørg, tlf. 213185/422585**